# Ferðaseðlaprísurin tódnar

**Tað gerst alsamt bíligari at flúgva, um tað ber til at gera nýtslu av teimum tilboðum, sum støðugt verða givin**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Atlantsflog bjóðar bíligar ferðir til Danmark í heyst*

*Savnsmynd*

**Vágar:** Atlantsflog bjóðar aftur bíligar ferðaseðlar millum Vágar og Danmark.

Til Kastrup slepst við serligum APEX ferðaseðli fyri smáar 2.100,- krónur, og og vikuskiftisferðir fáast fyri 300,- krónur færri, sigur Atlantsflog í tíðindaskrivi. Tilboðið upp á APEX ferðirnar er galdandi frá 7. august til 6. oktober, og bíligu vikuskiftisferðirnar fáast frá 7. august til 8. oktober.

Til Billund eru heldur fleiri avmarkingar, sigur Atlantsflog. Har fáast eisini vikuskiftisferðir fyri 1.795,- krónur. Men tær eru bert galdandi tíðarskeiðið 7. til 12. august, og 14. til 19. august. Eisini ber til at fáa serligar APES ferðir til Billund, sum eru galdandi í tíðarskeiðnum millum 7. august og 10. oktober.

Sum vanligt plagar at vera, liggja kunningardiskin hava lagt num. Fyri at fáa bíligu ferðaseðlarnar er galdandi fyri APEX ferðaseðilin, at minst tvey fólk ferðast saman, og at tey eru burtur sunnunátt og í mesta lagi 14 dagar.

Fyri vikuskiftisferðirnar er tað sama galdanda, tó so, at ferðin í mesta lagi má vara í fýra dagar.

Annað av teimum báðum ferðandi, sum kunnu nýta tilboðið, kann vera barn. Børn fáa tó avsláttur. Eru tey millum tvey og fimtan ár, er avslátturin 33 prosent av kostnaðinum. Børn undir tvey ár fáa heili 90 prosent drigin fra kostnaðinum.

Atlantsflog sigur í tíðindaskrivinum, at íroknað prísirnar er ferðaavgjald, men at avgreiðslugjaldið, sum er sett til kr. 220,- verður lagt afturat.



*Hedvig Jóhansdóttir letur upp myndlistaframsýning við Snarskivuna í Havn tann 7. august*

# Kvøða til lítla barnið

LISTASTEVNA
*tíðindaskriv*

Við Snarskivuna hjá Býráðnum í Havn letur unga listakvinnan Hedvig Jóhansdóttir upp myndlistaframsýning hósdagin 7. august kl. 16:00.

Hedvig, sum er útbúgvin námsfrøðingur við listfrøðiligum lærutilgongdum sum sergrein, er júst vorðin mamma. Tí kallar hon framsýningina »Kvøða til lítla barnið«. Talan er um akrylmálningar og blandaða tøkni. Umframt einstaklingaframsýningar í Føroyum og Danmark, hevur Hedvig eisini sýnt fram á ólavsøku- og Várframsýningum í Listaskálanum. Í heyst heldur hon fram at útbúgva seg á Billedskolen í Keypmannahavn. Framsýningin er úrslit av samstarvi millum Tórshavnar Býráð og Norðurlandahúsið, og er partur av Listastevnuni í ár.

# Tveir oljulekar í Havn

**Mikudagin fekk Tórshavnar Sløkkilið fráboðan um olju, sum fleyt í sjónum á Viðarnesi og í Vágsbotni**

OLJULEKI
*Heini í Skorini*





*Tórshavnar Sløkkilið fekk mikudagin fráboðan um heili tveir oljulekar í Havn, ein í Vágsbotni og ein á Viðarnesi*

Lítlu ternumurtarnir í Vágsbotni og á Havnarvág hava verið noyddir at funnið seg í eitt sindur av hvørjum seinastu tíðina.

Mikudagin fekk Tórshavnar Sløkkilið fráboðan um enn ein oljuleka í Vágsbotni, og ógreitt er, hvaðani oljan er komin. Hans David Hansen frá Tórshavnar Sløkkiliði sigur, at helst er talan um eitt skip, sum hevur lensað, tí hetta kemur meir enn so fyri.

Talan var um gear-olju, og hóast torført er at meta um nøgdina í litrum, nýttu 2-3 menn allan mikudagin at spara lítlu ternumurtunum fyri hesi óhumsku. Tá fráboðanin kom mikudagin, hevði oljan longu ligið í ein dag, og tískil høvdu sløkkiliðsmenninir skund at fáa oljuna úr sjónum.

## Eisini galið á Viðarnesi

Men nakrir av teimum ternumurtum, sum royndu at sleppa sær til rýmingar, gjørdust vónbrotnir, tí longri úti var talan eisini um olju, sum fór á sjógv.

Trolarin Steintór varð bunkraður á Viðarnesi, men oljan fleyt yvir, so umleið 1000 litrar fóru á sjógv. 5-6 tímar vórðu nýttir at fáa oljuna úr sjónum, har fýra sløkkiliðsmenn vórðu boðsendir.

Kanska ein gomul skrubba á havsins botni hevur hildið fyri, at tíðirnar vóru betri fyrr...

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum við gávum, blómum, telegrammum og uppringingum, gleddu meg á 70 ára degnum.

**Sigrid Jacobsen**
**Vági**



# Fyrsta royndin miseydnað



*Teir tríggir vatnskutaramenninir Atli S. Petersen, Sveinur Høgnason og John Vilhelmsen, hava sett sær fyri at fara til Danmarkar á vatnskutara. Fyrsta royndin, sum varð gjørd týsdagin miseydnaðist, og teir endaðu aftur í Føroyum. Teir royna tó aftur skjótast møguligt*

*Myndir: Maria Olsen*

**Seinnapartin týsdagin fóru teir tríggir Atli S. Petersen, Sveinur Høgnason og John Vilhelmsen avstað við vatnskutarum sínum við kós ímóti Danmark. Men ferðin fekk ein bráðan enda, tí hol kom á bensindunkarnar, og teir endaðu aftur í Føroyum**

VATNSKUTARAR
*Ingrid Bjarnastein*

Atli S. Petersen, Sveinur Høgnason og John Vilhelmsen hava sett sær fyri at fara úr Føroyum niður til Keypmannahavnar á vatnskutara. Ein ikki heilt vandaleys ferð um Atlanshavið, men teir eru uppsettir, og vilja avstað.

Túrurin hevur verið ávegis leingi, og nógv hevur verið gjørt fyri at savna saman pening og stuðul til ferðina, og fyrr í hesi vikuni var klárt at fara.

Seinnapartin týsdagin var klárt. Teir løgdu av landi frá Argjum, og settu kós ímóti Danmark. Men túrurin endaði fyrr enn ætlað, tí teir endaðu aftur í Føroyum.

Grundin til at teir vendu aftur var, at tríggir bensin dunkar vóru horvnir og tveir vóru klovnaðir. Hetta uppdagaðu teir, tá teir vóru komnir hálva leið til Hetlands, og mettu seg ikki hava nóg mikið av brennievni til at halda fram.

Á heimasíðuni hjá teimum á www.watercraft.fo stendur at lesa, at næsta royndin verður so skjótt líkindi verða til tess, so enn hava djarvu menninir ikki givið upp.

# Harry í Piddasa Handli

**Runavíkingurin Harry Knudsen lat hósdagin upp málningframsýning í Piddasa Handli. Framsýningin endar tann 13. august**

LISTAFRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

**Runavík:** Í gjár, hósdagin 7. august, lat Harry Knudsen upp málningaframsýning í Piddasa Handli.

Harry er 27 ára gamal og búsitandi í Danmark. Áðrenn ólavsøku hevði hann eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, og eisini hevur hann áður havt framsýning í hølunum hjá fyritøkuni Crawford í Danmark.

Nú er runavíkingurin so at síggja á heimavølli. Framsýningin verður opin til mikudagin 13. august.

# Frændur aftur á pall



*Frændur fara aftur á pallin um vikuskiftið. Tað verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og á Platform í Havn*

*Savnsmynd*

**Frændur fara nú aftur á pallin. Hesuferð verður tað í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og á Platform í Havn**

TILTØK
*Ingrid Bjarnastein*

»80´ini«, »Kaga upp í himmalin«, »Lívsmynd«, »Hundurin Brúni«... Ja, vit kenna teir øll. Og tað er jú ongin minni enn Frændur, sum eiga hesi vælkendu løg.

Til eina og hvørja veitslu er okkurt lag hjá kenda 80´ara bólkinum fastur táttur, og um vikuskiftið ber til at hoyra og síggja teir aftur á palli. Hesuferð verða teir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og á Platform í Havn. Frændur vóru eisini við á ólavsøkukonsertini í ár.

Í kvøld trína teir so á pallin í diskotekinum Platform í Havn. Har hevur eisini verið møguligt at keypa atgongumerki í forsølu, tí væntað var við nógvum áhugaðum.

Leygarkvøldið verða teir so aftur við ljóðførunum í hond. Tá verður tað í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har talan er um dans. Hann byrjar klokkan 23.30 og endar klokkan 3.45. Bussar koyra eisini í sambandi við tiltaki.